# Eingin trupulleiki við tveimum størvum

**Truplu politisku umstøðurnar gera, at Tjóðveldisflokkurin ikki fer at seta nýggjan landsstýrismann fyrr enn í fyrsta lagi á ólavsøku. Høgni Hoydal metir tað bera til at røkja tveir landsstýrissessir restina av tingsetuni**

POLITIKKUR
*Heri á Rógvi*

*Høgni Hoydal": Høgni Hoydal heldur ikki, at tað er nakar trupulleiki, at hann røkir tveir landsstýrissessir næstu fýra mánaðirnar, hóast tað ikki gongur í longdini, metir hann.*
*Mynd: Jens Kristian Vang.*



Gitingarnar, um hvør verður nýggjur landsstýrismaður í mentamálum, eru nógvar. Og hesar gerast ivaleyst bara fleiri og fleiri, tí nýggjur landsstýrismaður verður í fyrstu atløgu settur á ólavsøku.

Hetta ger formaður Tjóðveldisfloksins, Høgni Hoydal, greitt.

Orsøkin er, at Tjóðveldisflokkurin vil tryggja sær, at samgongan finnur betri stev, og tey politisku málini hjá samgonguni betri kunnu verða framd, eftir samgongukreppuna fyri stuttum.

Hetta merkir, at Høgni Hoydal heldur fram sum landsstýrismaður í mentamálum. Hetta starv hevur hann røkt so at siga síðani Annlis Bjarkhamar 4. mars varð søgd úr starvi sum landsstýrismaður.

Sostatt hevur Høgni Hoydal virkað sum mentamálaráðharri í ein mánað, og hann heldur fram í góðar fýra mánaðir afturat.

Formelt er ikki talan um tvey størv, men at Høgni Hoydal hevur fingið fleiri málsøki at røkja. Hinvegin er bygnaðurin í almennu umsitingini skipaður soleiðis, at landsstýrismaðurin í mentamálum er ovasti fyri Mentamálaráðið, og landsstýrismaðurin í lógarmálum er ovasti fyri Løgmálaráðið.

Spurningurin er, um tað er nøktandi – og kanska niðursetandi fyri mentamálini og lógarmálini - at sami landsstýrismaður røkir tvey størv í so langa tíð?

– Tað kundi tú sagt, um málsøkini ikki vórðu røkt. Við einum eyka innsatsi ber til at røkja størvini á ein nøktandi hátt, sigur Høgni Hoydal.

Hann vissar um, at tað er einki, sum bíðar óneyðugt í Mentamálaráðnum orsakað av støðuni.

Høgni Hoydal ásannar samstundis, at hendan støðan ikki er nóg góð í longdini, og tískil verður ein nýggjur landsstýrismaður settur, tá samgongan er betri fyri.

– Annlis Bjarkhamar hevði sett nógv ígongd, og hetta fylgi eg upp saman við umsitingini. Øll tey politiskuni málini verða rokkin, sigur Høgni Hoydal.

Føroya løgmaður, Anfinn Kallsberg, sum hevur ábyrgdina av at hava eftirlit við landsstýrsmonnunum, vil ikki gera stórvegis viðmerkingar til støðuna.

Ein partur av semjuni í samgonguni snúði seg um at halda tey ymsu málini innanhýsis, heldur enn at fara í fjølmiðlarnar, og hetta hevur løgmaður eftir øllum at døma tikið til eftirtektar.

– Hvør verður landsstýrismaður er nakað, vit viðgera í samgonguni og ikki í fjølmiðlunum, er tað einasta vit fáa at vita frá Anfinni Kallsberg í hesum umfarinum.

## Nógv evni

Spurningurin er, hvør nýggjur landsstýrismaðurin verður, er ikki viðgjørdur í Tjóðveldisflokkinun, upplýsir Høgni Hoydal.

– Men sjálvsagt eru tað nógv uppskot og nógvar gitingar kring landið, men vit hava ikki viðgjørt tað enn í floksleiðsluni, hvør nýggi landsstýrismaðurin skal verða.

Og líkt er til, at tjóðveldisfólk hava góða tíð at savna uppskot.

Og formaðurin hevur álit á, at flokkurin finnur ein góðan avloysarar til Annlis Bjarkhamar.

– Àhugin er altíð stórur, og vit mangla ikki skikkað fólk, sigur Høgni Hoydal, sum ikki metir sum annað enn ein positivan trupulleika at gera av, hvør skal vera nýggjur landsstýrismaður.

Hóast Høgni Hoydal hevur fingið fleiri málsøki, so fær hann kortini ikki tvífalda sína løn – hon er tann saman, líkamikið hvussu nógv málsøki, ein landsstýrismaður hevur undir hond.

# Norðoyatunnilin nærkast

**– Nú manglar bert tann síðsta viðgerðin, so er klárt at fara ígongd, sigur Bergur í Garði, formaður fyri Norðoyatunnilin**

NORÐOYATUNNILIN
*Heri á Rógvi*



*Líkt er nú til, at skjótt kann farast undir at bora ein tunnil millum Leirvík og Klaksvík. Eftir hvat skilst, er tað sannlíkt, at NCC aftur fer at standa á arbeiðsklæðunum.*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

Arbeiðið at gera Norðoyatunnilin kann eftir ætlan skjótt fara ígongd. À borðinum hjá Løgtinginum fríggjdagin liggur síðsta politiska málið til triðju viðgerð, og so er tann politiski parturin liðugur.

P/F Norðoyatunnilin hevur bíðað eftir politiskari støðutakan, sum er neyðug fyri at kunna fara ígongd. Men P/F Norðoyatunnilin hevur ikki ligið á lætu síðuni, og nógv fyrireikingararbeiðið er fingið frá hondini. So nógv, at ein endalig avgerð nærkast.

– Nú manglar bert tann síðsta viðgerðin hjá okkum, so er klárt at fara ígongd, sigur Bergur í Garði, formaður fyri Norðoyatunnilin.

– Øll tey formligu krøvini eru við at koma upp á pláss. Endalig avgerð verður tikin í komandi viku, sigur Bergur í Garði.

Nevndin og leiðslan fyri Norðoyatunnilin skal taka støðu til, hvussu arbeiðið skal bjóðast út.

NCC, sum hevur gjørt Vágatunnilin, hevur indikerað fyri Norðatunnilin, at teir kunnu gera arbeiðið upp á Norðoyatunnilin fyri somu takstir sum Vágatunnilin við ávísum broytingum. Arbeiðið verður mett at fara kosta 325 milliónir.

Tað frættist, at J&K Petersen og NCC í felag ætla at átaka sær arbeiðið, men hetta hava vit ikki fingið váttað.

Arbeiðið verður fíggjað á sama hátt sum við Vágatunnilinum. Eitt byggilán og eitt langtíðarlán verða veidd P/F Norðoyatunnilin, og landið skal so við játtanum á fíggjarlógini gjalda byggiláni aftur, og tað verða brúkararnir,sum skulu standa fyri at gjalda langtíðarlánið aftur.

Í fyrsta lagi um ársskiftið 2005-2006 verður klárt at koyra undir Leirvíksfjørð.

Eftir ætlan skal tunnilin fara av Borðoyarvík og koma upp miðskeiðis millum Leirvíksbygd og Brennistøðina.



# Fremja sálarligan yvirgang ímóti almennum starvsfólki

**– Tað kann undir ongum umstøðum góðtakast, at politikarar skalta og valta við mannalagnum, soleiðis sum teir gera við manningini á Strandferðsluni í løtuni, sigur Gunnleivur Dalsgarð, formaður í Starvsmannafelagnum**

ÓTRYGGLEIKI
*Áki Bertholdsen*



*– Tað er skelkandi at politikarar ikki himprast við at gera almenn starvsfólk til politiskar kastibløkur, sigur formaðurin í Starvsmannafelagnum, Gunnleivur Dalsgarð, sum er skelkaður av framferðini hjá politikarunum*

– Tað er heilt forkastiligt, soleiðis sum politikarar skalta og valta við mannalagnum.

Gunnleivur Dalsgarð. formaður í Starvsmannafelagnum, er rætt og slætt skelkaður av framferðini hjá politikarunum ímóti teimum, sum eru í starvi hjá tí almenna.

Hesa síðstu tíðina er manningin á strandfaraskipinum Dúgvuni søgd upp. Men nú skal hon kanska setast aftur í starv.

Hendan mannagongdin hjá politikarunum skelkar formannin í Starvsmannafelagnum.

Men hann sigur, at manningin á Dúgvuni er ikki eindømi og nú bíðar hann bara eftir, hvat tað næsta verður.

– Nú Strandferðslan skuldi spara, gjørdi leiðslan av at siga manningini á Dúgvuni upp. Men síðani hevur politisk ósemja tikið seg upp um sparingina og nú ljóðar, at uppsagnirnar skulu takast aftur.

– Slík mannagongd er undir alt lágmark og hetta er ein mannagongd sum Starvsmannafelagið undir ongum umstøðum kann góðtaka, sigur Gunnleivur Dalsgarð.

Men akkurát, hvat felagið kann gera, veit hann ikki.

– At missa arbeiðið er eitt tað ringasta sum kann henda einum menniska. Og at siga fólki upp, er tað sama sum at rykkja alt tilverugrundarlagið undan teimum. Tað er eitt slag yvir nakkan sum næstan ikki kann samanberast við nakað annað.

Formaðurin í Starvsmannafelagnum er sostatt skelkaður av, hvussu lætt tað fellur politiska myndugleikanum at skalta og valta við mannalagnum, soleiðis sum tað er gjørt í hesum føri.

## Beklagiligt arbeiðslag

Hann sigur, at tað er heilt beklagiligt, soleiðis sum tað politiska valdið arbeiðir.

– Tá ið fíggjarlógin varð viðgjørd og samtykt, vóru tað politikarar, sum brúktu stór orð um, at nú skuldi sparast og eykajáttanir komu ikki upp á tal.

– Ein partur av hesum sparingum skuldu gerast á Strandferðsluni, sum varð skerd nakrar milliónir.

Gunnleivur Dalsgarð sigur, at tí eigur tað ikki at koma óvart á politikarar, at Strandferðslan skal spara, tí tað hava teir sjálvir samtykt.

– Tað er umráðandi at leggja dent á, at tá ið fíggjarlógin varð samtykt, vistu politikararnir av, at játtanin var so lág, at skerjingar máttu gerast.

– Sostatt fekk leiðslan á Strandferðsluni boð um at spara. Ein avleiðing av hesum er, at hon setir sparitiltøk í verk og ein partur av hesum er at siga manningini á Dúgvuni upp.

– Men tá ið tað hendir, fáa sparingarnar knappliga persónligar avleiðingar fyri ávísar politikarar, tí nú er tað teirra lokala økið sum verður rakt, og so kemur róp í.

Úrslitið av tí er, at uppsagnirnar kanska verða tiknar aftur í eini líka skjótari handavending, sum tær vóru útskrivaðar.

Formaðurin í Starvsmannafelagnum ásannar hvussu lítil álvari býr í politikarum.

– Tað skal sparast fyri at síggja gott út á fíggjarlógini. Men hvørja ferð ein sparing verður sett í verk, kemur róp í hjá teimum politikarunum, sum eru úr økinum, har sparast skal. Tað skal sparast alla aðrastaðni, bara ikki á teirra egna heimabeiti. Sparingar skulu bara gerast tá ið tað ikki rakar teirra egna valdømi.

Gunnleivur Dalsgarð sigur, at soleiðis verður apan send víðari og nú situr hann bara og bíðar eftir, hvat tað næsta verður.

Verða uppsagnirnar á Dúgvuni tiknar aftur, skal sparast onkra aðrastaðni og nú sparingarnar um Leirvíksfjørð fóru í vaskið, er bara at bíða eftir, hvat Strandferðslan so skal spara og hvørjar avleiðingar tað fær,

Hann sigur, at hetta er forkastiligt og prógvar í veruleikanum, hvussu lítið at sær komnir politikarar eru. Fólk verða søgd upp í blindum, ella upp á gjøt, og so verða tey kanska sett aftur. Síðani verður apan koyrt runt so at onkur annar verður sagdur upp. Men rópa politikararnir úr tí økinum, sum tá verður rakt, nóg hart, verða tær uppsagnirnar kanska eisini tiknar aftur. Soleiðis melur alt í klingur. Hetta er at gera mannalagnur til politiskar kastibløkur og tað kann okkara politiska vald heilt einfalt ikki loyva sær. Hetta má halda uppat, sigur Gunnleivur Dalsgarð.

– Sostatt er tað ongin ið kann føla seg tryggan og tað er heilt ótolandi hjá almennum starvsfólki. Og tað er heldur ikki í samsvari við útsøgnir hjá løgmanni og øðrum politikarum, sum seinastu tíðina í samabndi við landsfornfrøðingin og uppsagnirnar í heimarøktini hava brúkt nógva tíð at tosað um tað neyðuga í, at tryggleiki er í almennu umsitingini.

Tað, sum teir sýna í verki er júst tað øvugta: Skapa ótryggleika og órógv, sigur Gunnleivur Dalsgað.

– Slík framferð, sum tann ímóti starvsfólkunum á Landssjúkrahúsinum og sum tann, ið manningin á Dúgvuni er fyri í hesum døgum, er einki minni enn sálarligur yvirgangur og skapar bæði órógv og ótryggleika og tað vilja vit ikki finna okkum í, sigur Starvsmannafelagið.

## Lukta pengar

Hann heldur eisini lítið um tosið, sum nú er um, at privatir skulu reka siglingina um Leirvíksfjørð.

– Jógvan við Keldu hevur enntá skuldsett tað almenna fyri at hava stolið hendan vinnuvegin frá teimum privatu.

– Hetta er heilt burturvið. Sannleikin er, at tað almenna varð noytt til at átaka sær uppgávuna, tá ið tað privata kastaði frá, tá ið neyðugar íløgur skuldi gerast.

– Men nú hevur tað almenna bygt eina tænastu upp og nú tað er fingið at virka, koma fólkafloksmenn kropp av kroppi og skulu hava siglingina á privatar hendur. Tað kann bara vera tí at teir aftur hava følt luktin av pengum, sigur Gunnleivur Dalsgarð. Annars heldur hann, at tað er sjálvsagt, at tað er tað almenna sum hevur Strandferðsluna um hendi, tí flutningur ímillum oyggjarnar er ein almenn uppgáva!

## Góðar umstøður hækkaðu ikki støðið

Gunnleivur Dalsgarð sigur, at annars hava politikarar hesi seinastu árini lagt stóran dent á, hvussu týdningarmikið tað var, at teir fingu betri arbeiðsumstøður. Tí var tað altumráðandi, at teir bæði fingu nógv hægri løn og eitt fínt løgtingshús fyri at støðið í tí politiska arbeiðnum kundi hækkast.

– Og teir fingu bæði Teir fingu bæði stóra lønarhækking og nýtt løgtingshús. Og tá ið peningurin til løgtingshúsið var uppi, fekk ongin av teimum ringa samvitsku av at tríva niður í landskassan eftir 17-18 milliónum afturat til at gera húsið liðugt fyri.

– Men nú ein tíð er farin kunnu vit ikki annað enn staðfesta, at tað hevur avgjørt ikki hækka støðið í politiska arbeiðnum, at politikararnir bæði hava fingið stóra lønarhækking og fínt løgtingshús, sigur Gunnleivur Dalsgarð turrisliga.

# Tjóðveldisfólk hittast í Hósvík

**Hetta vikuskiftið hevur tjóðveldisflokkurin floksting í Hósvík við føroyskum og útlendskum gestarøðarum**

POLITIKKUR
*Áki Bertholdsen*

Hetta vikuskiftið hevur tjóðveldisflokkurin sítt árliga floksting. Flokstingið er landsfundur, ella aðalfundur floksins, og í ár verður flokstingið í bygdarhúsinum í Hósvík

Umframt vanligu skránna, er eisini ymiskt annað, forvitnisligt, á skránni, eitt nú eru bæði føroyskir og útlendskir gestarøðarar.

Flokstingið verður sett fríggjakvøldið klokkan 19.30. Tá verður roknskapurin lagdur fram og klokkan átta fer formaður floksins at leggja ársfrágreiðingina fram.

Klokkan nígggju fríggjakvøldið verður so politiskt orðaskifti um formansfrágreiðingina og tá verður skift orð um m.a. fullveldismálið, fiskivinnumál, sosialmál og útbúgvingar

Men fríggjadagurin er jú ein forvitnisligur dagur í føroyskum tónleikahøpið, tí hetta er jú kvøldið, tá ið Guðrun Sólja Jacobsen skal syngja í finaluni í Stjerne for en aften.

Og leiðslan í tjóðveldisflokkinum ætlar ikki at forkoma møguleikanum hjá teimum, sum koma á flokstingið, at fylgja við í kappingini, so á flokstinginum verður møguleiki at síggja Guðruna í sjónvarpi.

## Gestarøðarar

Leygarmorgunin verður lagt til brots við morgunmati klokkan 9 og aftaná, klokkan 9.30, verður politiskt orðaskifti.

Tá fara tveir gestarøðarar at halda røðu, teir verða Josef Motzfeldt, formaður í grønlendska loysingarflokkinum, Inuit Ataqatigiit, vanliga stytt IA, og eitt umboð fyri íslendska bróðurflokkin hjá tjóðveldisflokkinum.

Eftir døgverða heldur politiska orðaskiftið fram klokkan 13 og tá verður ein annar, forvitnislig røða, tí tá fer Hermann Oskarsson, formaður í búskaparráðnum, at tosa um búskaparligu møguleikarnar.

Aftaná drekka, klokkan 15, fara ymsar nevndir hjá flokkinum at leggja fram og eitt nú fer flokstingið at viðgera fleiri uppskot um serlig framtøk fyri flokkin.

Aftaná fer flokkurin at velja fólk í ymisk álitisstørv, eitt nú at velja sjálva floksstjórnina.

Øll hava atgongd til flokstingið og tá ið politiskt orðaskifti er, hava eisini øll høvi at taka orðið.



*Á flokstinginum hjá tjóðveldisflokkinum í Hósvík hetta vikuskiftið, fer Hermann Oskarsson, formaður í búskaparráðnum at tosa um búskaparligu møgugleikarnar í framtíðini*